## DAGSINS MEINING

# Sýnið varsemi!

Stígur er komin í føroyska búkapin, frættu vit í vikuni. Stjórin á Strandfaraskipum Landsins boðaði í einum fjølmiðli frá, at eingin vøkstur hevði verið síðani í vár. Hetta kemst óivað av, at farmaflutningurin er stagneraður, og fólk setast kanska aftur at ferðast. Eisini hava vit frætt, at ferðafólkatalið hjá flogfeløgunum er lækkað alt árið. Hetta sigur kanska ikki so nógv. Vit hava havt stóran vøkstur, og fyrr ella seinri steðgar vøksturin. Tað sigst, at lítið skal til, áðrenn tað sæst aftur á farmaflutninginum. Lækka inntøkurnar nakað, so keypa fólk minni.

Men seinri í vikuni staðfestu Hagtíðindi, at fiskaprísurin er lækkaður munandi í ár. Og tað er meiri álvarsamt. Harafturat kundu Hagtíðindi siga okkum, at nógv verður veitt av smáfiski. Og hetta er eisini álvarsamt. Tí, lótu vit vera við at fiska smáfiskin, kundu vit fingið fleirfalt burtur úr tí smáttfallandi hýsuni um tvey ár, kundi ein fiskifrøðingur upplýsa. Men í sama andadrátti varð lagt afturat, at orsøkin var, at teir góðir árgangir høvdu verið. Tað er at fegnast um. So nú er at vóna, at myndugleikarnir steingja tey øki, har smáfiskurin heldur til.

Lækkandi prísur á fiski og smærri nøgdir síggjast skjótt á útflutningstølunum. Í vikuni kundi ein búskaparfrøðingur eisini staðfesta, at útflutningurin var minkaður, men at ferð var framvegis á búskapinum, tí innlendska virksemið er stórt. Tað merkir, at vit keypa og byggja enn sum áður. Men hesin "dansur" heldur skjótt uppat, um útflutningurin minkar, tí tað er útflutningurin, sum fær inntøkuna til landið. Eisini skulu vit minnast til, at nógvur fiskur fer óvirkaður av landinum, og tað merkir minni virði og minni arbeiði í landinum. Harafturat vita vit, a talifiskur er seldur fyri heldur lágan prís, og at alivinnan hevur verið fyri bakkastið. M.a. av sjúku, og í óveðrið fóru í vár stór virði fyri skeyti.

Hesir veruleikar siga okkum, at vit eiga at vera á varðhaldi búskaparliga. Í hesum døgum verður uppskot til figgjarlóg gjørt í Fíggjarmálastýrinum, samstundis sum samgonguflokkarnir togast um, hvussu útreiðslur og íløgur skulu raðfestast. Eitt er vist, at duga samgonga og andstøða sær ikki hógv nú og binda um heilan fingur – tó uttan at darva menning og framburði – hava vit ikki lært nógv av áttatiárunum.

Nógvar íløgur eru á pappírinum. Ikki minst á samferðsluøkinum. Men tær kunnu saktans bíða, samstundis sum íløgur í trivnaðin hjá fólkinum – í býli, baraansing, eldra- og heilsuøkið – verða tiknar fram á listanum, sum landsstýrisflokkarnir nú togast um. Sýnið varsemi meðan tíð er! Prioriterið rætt.

– – –

# Vælkomin Skotland

Í dag stendur so slagið á Svangaskarði. Vit skulu spæla móti grannatjóð okkara Skotlandi. Verið hjartaliga vælkomnir skotar og landslið tykkara. Hugaligt er tað í hesum døgum at síggja hundraðtals skotar í gøtunum. Fótbólturin vísir her sítt fjølbroytta andlit - hvussu hann setir síni merki uttan fyri vøllin. Tað er ein sannroynd, at í kjalarvørrinum á fótbóltinum ber til at byggja brýr millum tjóðir og fólk og skal tað vera vón okkara, at føroyingar og skotar fara at koma hvørjum øðrum meira við. Løgið at tvey fólk, sum eru næstu grannar, í veruleikanum hava so lítið við hvørt annað at gera. Vónandi kunnu Smyril Line, Atlantsflog, Ferðaráð og landsliðið vera við til at menna samvinnuna millum hesar báðar tjóðir. Annars væl vald skilaorð, sum umboð fyri Ferðaráðið hevði í ÚF-samrøðu fríggjamorgun. Gott í tykkum. Okkum tørvar slík fólk at skapa forstáilsi og vera við til at byggja brýr.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Varin fíggjarpolitikkur alneyðugur

**Kristina Háfoss**
*Løgtingskvinna Tjóðveldisfloksins*



**Nú fyrsta fíggjarlógin í hesum valskeiðnum skjótt verður løgd fyri tingið, skal tað vísa seg um veruligur politiskur vilji er fyri, at fremja einar sjálvstøðugar Føroyar í verki. Skal politiska málið fremjast eins og hædd skal takast fyri búskaparligu støðuni í Føroyum, er tað alneyðugt og eitt krav at íløgukarmurin verður hildin, at rakstrarútreiðslurnar ikki vaksa meira enn lønarvøksturin og at yvirskotið á fíggjarætlanini veksur ár um ár.**

### Upphitaður búskapur og íløgutørvur

Ein av størstu búskaparligu trupulleikunum í løtuni er, at føroyski búskapurin er upphitaður. Hetta vísir seg í dag m.a. við manglandi arbeiðsmegi og stórum lønarvøkstri. Tí er tað ein sera óheppin støða, at íløgutørvurin í Føroyum samstundis er ovurstórur, tí øktar íløgur í Føroyum krevja sjálvsagt arbeiðsmegi v.m. Orsøkin til stóra íløgutørvin er sjálvsagt, at íløgustøðgur varð øll kreppuárini og tí hevur tørvurin verið hareftir seinastu árini.

### Íløgukarmurin skal haldast í 2003

Men sitandi landsstýri má gera sær púra greitt, at skal peningur verða til støðugar íløgur í framtíðini - sambært langtíðarætlanini v.m. - má haldast aftur í hesum døgum. Ein enn meira upphitaður búskapur vil bert geva minni í landskassan til íløgur o.a. komandi árini. Av tí, at nýggja Suðuroyarskipið krevur heilar 107 mió. og Landssjúkrahusið 35 mió. eru bert góðar 100 mió. kr. eftir av íløgukarminum á 250 mió. kr. Íalt skulu allar aðrar íløgur sostatt haldast innanfyri karmin á 100 mió. kr. - og hetta er og verður eitt ófrávíkiligt krav. Suðuroyarskipið verður bygt uttanlands og ávirkar henda íløgan tí ikki føroyska búskapin í sama mun og aðrar innanlendis íløgur, men hetta er bert at gleðast um í hesum døgum, og eigur íløgukarmurin als ikki at víðkast av hesi orsøk.

### Rakstrarútreiðslur og raðfestingar

Sum kunnugt varð fíggjarætlanin fyri 2002 ein fíggjarætlan, sum í mangar mátar varð merkt av, at valár var. Vanliga verður undanfarna fíggjarlógin nýtt sum útgangsstøði fyri komandi fíggjarlóg, og eru lunnar harvið lagdir undir einum høgum útreiðslustøði fyri 2003.

Uppgávurnar hjá tí almenna gera, at tað almenna altíð kann nýta meira pening, men tað er av alstórum týdningi, at vit gera okkara til, at almennu rakstrarútreiðslurnar ikki gerast ov stórar. Hetta kann gerast ein sera tung byrða fyri skattgjaldaran og samfelagið sum heild - serstakliga um verri tíðir koma.

Tí er alneyðugt, at um valt verður at økja rakstrarútreiðslurnar á einum øki - og hetta er neyðugt, eitt nú á almanna- og heilsuøkinum - skulu sparingar til á øðrum økjum. Lógarbundnu rakstrarútreiðslurnar vaksa óivað og tí skal peningur sparast aðrastaðni, helst við lógarbroytingum, tí rakstrarútreiðslurnar mugu ikki økjast meira enn lønarvøksturin í 2003 - í mun til valárið 2002. Best hevði verið um rakstrarútreiðslurnar als ikki vuksu í krónur og oyrum, men hetta verður óivað torført at fremja í verki.

### Økt yvirskot á hvørjum ári

Samgonguskjalið staðfestir eisini heilt klárt, at yvirskotið á fíggjarlóg landsins skal vaksa á hvørjum ári í hesi valskeiðnum. Alt annað vildi eisini verið í andsøgn við sjálvbjargniskósina, og tí skal hesin setningur haldast til fullnar. Yvirskotið fyri 2002 verður væntandi 100-150 mió. kr. og má tí virkast fyri, at yvirskotið fyri 2003 gerst størri enn hetta.

### Politiska og búskaparliga frælsið

Tá fólkaatkvøðan um føroyskt fullveldi varð avlýst á vári 2001, valdi føroyska stjórnarvaldið at vinna føroyingum búskaparliga og umsitingarliga frælsið, áðrenn politiska frælsið varð vunnið. Hetta setur eitt nú stór krøv til komandi fíggjarlóg - og skal tað nú vísa seg, hvørt nakar veruligur politiskur vilji er til at ganga hesa sjálvbjargnisleið.

Landsstýrið hevur sett sær sum mál at fremja føroyskt sjálvbjargni í verki. Samstundis bera øll búskapartekin boð um, at vit í hesum døgum skulu verða varin við, at seta meira ferð á búskapin.

Tí er alt sum talar fyri, at ein varin fíggjarpolitikkur má og skal fremjast komandi árini.

## Tøkk

Hervið vilja vit siga hjartaliga takk til øll tykkum mongu, sum sýndu samkenslu, tá ið okkara elskaða kona, mamma, vermamma og omma

**Dinna Hermannsdóttir**

doyði og varð jarðað.

Tøkk til tann stóra skara, sum fylgdi henni til hennara seinasta hvíldarstað. Tøkk til tykkum á B7, prestin Sonju Klein fyri vøkru og troystarríku orð, sangarar og øll onnur, sum komu inn á gólvið, ringdu, skrivaðu og sendu blómur og kransar.

*Familjunnar vegna*
**Sjúrður**
**Ingi, Birgit, Kári og Heri**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:** Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Yvirtøkan av fólkakirkjuni

**Heðin Zachariasen**
*løgtingsmaður fyri Fólkaflokkin*



Tá talan er um yvirtøku av fólkakirkjuni hava vit samgonguskjalið at halda okkum til. Har verður sagt millum annað, at allir partar, sum varða av fólkakirkjuni, verða við í fyrireikingararbeiðinum. Hetta eigur og skal haldast, sum eg eisini segði undir viðgerðini í samband vit fyrispurningin frá Lisbeth L. Petersen um fólkakirkjuna. Á henda hátt verður arbeiðið so dygdargott, sum tað kann blíva, og tað verður bara til gagns fyri allar partar.

Sum flest øll vita, so gingu bæði Javnarflokkurin og Sambandsflokkurin við til yvirtøku av fólkakirkjuni, tá samgongusamráðingar vóru í vár, og tað kom eisini fram í viðgerðini í tinginum. Kunnu vit arbeiða á tann hátt, at allir 32 løgtingslimir atkvøða fyri yvirtøkuni av fólkakirkjuni, hevði tað verið ein sigur fyri málið viðvíkjandi fólkakirkjuni.

Fólkakirkjan er í dag ein trygg og vælvirkandi kirkja. Tað skal kirkjan eisini framhaldandi verða, tá ið fólkakirkjan í framtíðini verður føroysk. Vit eiga at yvirtaka fólkakirkjuna, og vit eru eisini førir fyri tí. Vit skulu skipa so fyri, at fólkakirkjan verður ein góð og trygg kirkja fyri allar føroyingar, eisini í framtíðini.

Tá eg hugsi um yvirtøku av fólkakirkjuni síggi eg ikki, at kirkjugongdin verður nakað broytt frá tí degi at kirkjan er yvirtikin. Einasti munurin verður, at kirkjan er á føroyskum hondum og lóggávan føroysk.

Eg eri ikki samdur við Annlis Bjarkhamar í, at vit bara skulu yvirtaka kirkjuna og so regulera og gera lógir aftaná. Vit mugu gera nýggjar lógir ella yvirtaka lógirnar samstundis sum kirkjan verður yvirtikin. Hesi viðurskiftini eiga at verða púra greið, tá ið yvirtøkan fer fram, so at allir føroyingar vita, hvat tað kemur at siga í tí dagliga, tí vit kenna kirkjuna sum hon er ídag.

Umframt sínar kirkjuligu uppgávur, hevur fólkakirkjan nakrar uppgávur, sum eg meti at vit øll eiga at gjalda fyri. Eingin orsøk er til at flyta hesar uppgávur frá fólkakirkjuni, tí at kirkjan verður føroysk. Vit hava heldur ikki hoyrt nakað um, at tær uppgávur, sum í dag liggja hjá kirkjuni, ikki hava verið nøktandi. Harafturímóti haldi eg, at hetta hevur verið ein vælvirkandi skipan og meini tí, at hesar uppgávur framhaldandi eiga at liggja hjá kirkjuni. Um so verður, at uppgávurnar skulu flytast frá kirkjuni, er vandi fyri, at vit skulu hava nýggjan skrivstovubygning og seta fleiri fólk í starv. Sum nú er, liggur hetta arbeiði væl skipað runt alt landið so nær borgarnum, sum tað kann verða. Tá talan er um, hvat hesar uppgávur kosta, kundi verið skilagott at kanna hetta, soleiðis at allir føroyingar vita, hvat vit gjalda fyri, tá talan er um fólkakirkjuna.

Fólkakirkjan verður í dag goldin yvir skattin og tað meini eg at hon framhaldandi eigur at verða. Spurningurin er so, um skipanin, sum hon er ídag, har ein partur verður goldin sum kirkjuskattur, heldur fram, ella um útreiðslurnar skulu býtast øðrvísi, tá ið fólkakirkjan er vorðin føroysk.

# Eitt plágandi ítriv

**Hilmar Simonsen**



Í hesum døgum hevur ein tann størsti religiøsi provokatørurin í DK, Moses Hansen, verið á vitjan í Føroyum. Mong minnast óiva seinast hann var her, fyri góðum ári síðani, tá hevði Dimmalætting reportasju av honum, so stóra og umfatandi, at ein skuldi trúð, at hetta var ein ella annar ambassadørur, sum komin var á vitjan. Myndir av armrørslum og ymiskum andlitsbrøgdum av hesum manni vóru bæði stórar, og nógvar í tali.

Nú var hann so aftur her. Og spyrjast kann, um okkum yvirhøvur nýtast hendan brúna, hvíthærda purluta mannin at undirhalda okkum? Vit hava jú ríkiliga nógvar 'entertainarar' av hasum slagnum framman undan her á landi.

### Útbreiðsla

Útvarpssendingin "Barometrið", sum eftir mínum tykki er ein av teimum frægastu sendingunum, sum nakrantíð hava verið í eturinum í Føroyum, var inni á gólvinum hjá útvarpsrásini Lindini fríggjadagin 30. aug. 02 og tosaði við onkran av andsbrøðrunum hjá Mosesi Hansen.

Tað skal ikki so nógv til fyri at fáa meg at undrast, tá eg hoyri sovorðin fólk tosa um moral o.a., men eitt av tí sum sló meg mest var at hoyra tey í Lindini fortelja, hvussu týdningarmikið tað er fyri tey at provokera, og tirra fólk við sínum religiøsa vavgreyti. Um tey t.d. stóðu framman fyri eini áhoyrarafjøld okkurt kvøldið og kundu framprovokera eitt klimaks, so at áhoyrarnir til seinast fingu propp av sær og byrjaðu oysa ókvæmisorð á seg, og grýta jesussuppu ella okkurt líknandi eftir teimum, so føldu tey, at tey høvdu vunnið ein sigur. Tí mátistokkur teirra fyri success kundi mátast í útslagnum av mótreaktiónum hjá teimum, sum vóru útsett fyri teirra ágangi. Og tess fleiri ókvæmisorð og kastaðar lutir tey fingu á seg, tess betri hevði átak teirra, eftir øllum at døma, eydnast. Ikki eiti á hugburði.

Ymisk eru ítrivini hjá fólki, men at hava fingið sær eitt ítriv sum gongur út upp á, at sjenera onnur fólk við síni sjálvrættvísu og naivu ímyndan, at man á hendan hátt tænir einum høgum endamáli, tað má nærum metast sum 'dummere end politiet tillader'.

### Kraftagerðarfólk

Tá boðað var frá, at áðurnevndi danski religiøsi, snævurskygdi fanatikarin aftur skuldi koma á vitjan í Føroyum var tað sum um, at ein annars deiligur friður, sum hevði verið síðani Ólavsøku, var brotin. Symbolikkurin gav seg til kennar, tá ódnarveðrið brast á síðst í august mánaði samstundis við, at Moses Hansen kom til landið, eftir at veðrið hevði verið so vælsignað stórsta partin av mánaðinum.

Til alla lukku eru vit væl meiri upplýst enn fólkini í tí lítlu svensku bygdini, sum umleið næstseinasta aldarskifti, so væl framført í filminum "Jerusalem" hjá Bille August, blivu invaderaði av einum fremmandum religiøsum fanatikara, sum megnaði at forpesta eina annars so harmoniska og idylliska landsbygd við sínum forheksaða møsni um dómadag, Himmali og Helviti.

Men hóast flestu fólk í dag eru nóg upplýst til at duga at skyna, at hetta slag av øsing er fullkomiliga láturligt og átti at hoyrt heima á psykiatrisku deild, so eru tað eisini summi, serliga ung leitandi, og móttakilig menniskju, sum bíta á hendan húkin, og harvið blíva darvaði í síni natúrligu mentalu menning.

Meðan nógv verður gjørt frá almennari síðu fyri at fyribyrgja misnýtslu av øðrum rúsandi evnum, sýnist tíverri alt ov lítil áhugi vera í, at verja tey ungu ímóti religiøsum humbukki. Tað syndarliga er oftani, at tá hesi ungu einaferð rakna við aftur, eftir at hava gingið drukkin í fleiri ár av 'spiritus sankti' (heilagum anda), so koma timburmenninir, og viðurkenningin av, at hava søplað fleiri ár burtur í einari meiningsleysari fantasi-tilveru.

Tað munnu neyvan vera serliga nógvir føroyingar sum gleðast um, at hava hendan Moses á vitjan. Religiøsir fanatikarar hava tað við ikki at respektera aðrar, og í flestu førum, nógv sunnari lívsáskoðanir enn teirra egnu. Um íðinskapurin til at missionera hevði verið proportionalur við dygdina í eini lívsáskoðan, so er ongin ivi um, at ISLAM hevði megað verið mett sum tann rættasta lívsáskoðanin.

Men veruleikin er nokk ein heilt annar - at tess ídnari summi eru til at missionera, tess ivasamari er tað, hvussu beinari leið hesi fólkini eru á, og hvussu væl tey hvíla í sær sjálvum. Áhugavert hevði verið, um t.d. Gallup hevði kunnað gjørt eina kanning sum vísti okkum, hvussu stórur prosentpartur av øllum føroyingum í veruleikanum ynskja religiøsan ørskap í Føroyum.

# Hvat er tryggari nú?

**Lisbeth L. Petersen**
*Sambandsflokkurin*



Í sambandi við viðgerðina av fyrispurningi týsdagin um yvirtøkuna av fólkakirkjuni, skal beinanvegin verða sagt, at svarið als ikki var nøktandi fyri meg sum spyrjara.

Ein orsøk til spurningin var framferðarhátturin, sum eftir øllum brøgdum **Tjóðveldisflokkurin** tykist standa fyri, samb. tí sum fram kom undir og aftaná orðaskiftið.

Samgongulimir úr øðrum flokkum søgdu seg ikki vita, hvussu fram var farið, og svarið frá landsstýriskvinnuni samsvaraði ikki við tað okkara kirkjumyndugleikar siga. Landsstýriskvinnan segði, at avvarðandi myndugleikar eru tiknir við uppá ráð, meðan hetta verður avsannað frá fleiri síðum av teim, sum talan er um.

Ein orsøk til fyrispurningin var eisini tann ótryggleiki sum valdar, og konkretu spurningarnir vóru ikki svaraðir.

### Onki greitt svar

Tá bæði Annlis Bjarkhamar og nú eisini Kristina Háfoss í fjølmiðlunum eru sannførdar um, at alt verður so gott og trygt, og ikki skilja at øll onnur ikki hugsa tað sama, tí nú verður alt í føroyskum hondum, so er tað so grunt og ófullfíggjað svar og støðutakan, at orð ikki finnast fyri tí.

Hvussu fer lógarverkið at síggja út? Hvør fær høvuðsábyrgdina av fólkakirkjuni? Verður tað ein fólkakirkja ella fríkirkja? varð m.a. spurt, men eingin av hesum spurningum varð svaraður.

### Óðamannaverk

Kann ikki lata vera við at hugsa um hina landsstýriskvinnuna, sum eisini tosaði um at alt bleiv trygt og gott í føroyskum hondum, tí nú var fullveldið í eygsjón, og bæði heilsu- og almannaverkið var tryggjað fyri framtíðina, fyri ikki at tala um komandi eftirlønarskipanina, ið fór at verða einastandandi !!

Eftirlønarskipanin kom ikki niðan í tingið, og hvat er vorðið tryggari á heilsu- og almannaøkinum? Landsstýriskvinnan hvarv eisini og fór í andstøðu !

Fólk sum starvast innan fólkakirkjuna og sum taka undir við yvirtøku, siga beinleiðis, at tað er óðamannaverk at yvirtaka fólkakirkjuna nú, tí kirkjan er ikki fyrireikað til yvirtøkuna enn, men hetta leggja tjóðveldistinglimir og landsstýriskvinnan lítið í.

### Yvirtøkan

Tá løgmaður nú sigur, at sjálvt Sambandsflokkurin tekur undir við yvirtøkuni, so skal eg boða frá, eins og eg gjørdi tað undir orðaskiftinum, at tað verður ikki undir slíkum umstøðunum, at løgmaður skal vænta sær undirtøku frá flokkinum.

Sambandsflokkurin hevur sagt, at verður alt væl og virðiliga fyrireikað, allir partar tiknir við í arbeiðið, so vit vita hvat vit gera og hvat vit yvirtaka, og eru fíggjarligar umstøður til tess, so kunnu vit taka undir við tí, og hesa støðu halda vit fast við, men eg vil eisini leggja dent á, at **ongar av hesum treytum eru uppfyltar.**

†

Tað verður hervið kunngjørt, at okkara góða mamma, vermamma, omma og langomma

**Jenny Lamhauge**
**Tórshavn**

andaðist fríggjamorgunin 6. september 79 ára gomul.

*Fyri tey avvarðandi*
**Eyðfinn, Berghild og Fía**